## Norðurlendsk bókasavnsvika

**12. – 18. november 2001**

**Tíðindaskriv**

Fyri fimtu ferð verður skipað fyri bókasavnsviku. Evnið hesuferð er »Orð & løg í Norðurlondum«.

Norðurlendskur skaldskapur í bundnum máli, norðurlendskar vísur og norðurlendskur tónleikur vera í fokus.

Undanfarin ár hevur ein tekstur verið lisin, men ístaðin fyri at lesa ein valdan tekst, fara vit í ár at syngja tríggjar norðurlendskar sangir. Sangirnir eru teir vælkendu: »Tá tú piparkøkur bakar« eftir Thorbjørn Egner, »Fjarild vingad syns på Haga« eftir Carl Michael Bellman og »Svantes lykkelige dag« eftir Benny Andersen.

Í ár hava yvir 1000 bókasøvn, harav seks úr Føroyum, meldað seg til norðurlendsku bókasavnsvikuna.

Á Landsbókasavninum verður vikan hildin við einum tiltaki hósdagin 15. november klokkan 19.30.

Á skránni verður sangur og uppplestur.

Rytmiska kórið í Hoydølum fer at syngja teir útvaldu sangirnar, umframt aðrar norðurlendskar sangir. Uttan iva verður eisini høvi hjá áhoyrarunum at syngja við.

Egi Dam og Páll Danielsen úr Grímu fara at lesa úr brævaskiftinum millum Heðin Brú og Chr. Matras. Upplesturin av brævaskiftinum var fyri fyrstu ferð framførdur í samband við 100 ára hátíðarhaldið fyri Heðini Brú.

# Mobilstrálur og sms-tummil

**Fartelefonirnar hava gjørt innrás í flest øllum londum í Evropa tey seinastu árini. Ikki kemst undan, at eisini føroyingar eru raktir av hesi fartelefonfarsóttini, og eisini heilt smá børn brúka hesi tólini, ið uttan iva eru hent, men tó ikki heilt vandaleys**

FARTELEFONIR
*Ingrid Bjarnastein*

Serfrøðingar á fartelefon økinum hava júst sligið fast, at tá eitt fimm ára gamalt barn brúkar eina fartelefon, so verða strálurnar tiknar inn í allan heilan. Hetta skrivar danska blaðið B.T.

Yngri børn, sum tosa í fartelefon, súgva upp til 50% meira av strálum inn í heilan enn vaksin fólk.

Eisini staðfestir nýggja kanningin, at hjá børnum í 10 ára aldri og uppeftir, verða strálurnar bert tiknar inn í teir partarnar av heilanum, har telefonin verður hildin ímóti.

Henda kanning fær fleiri læknar og serfrøðingar at halda, at børn skulu ikki tosa í fartelefon fyrr enn skølturin er liðugur at vaksa.

### Sms-tummil

Ein annar vandi, ið kemst av fartelefonini verður kallaður "sms-tummilin".

Læknar eru farnir at ávara ímóti hesum sokallaða sms-tummlinum, tí hetta er ein áhaldandi, ógvuslig og eintáttað tyngd á tummilin. Hetta kann hava við sær, at tummilfingurin í fyrsta umfari verður raktur av vødda- og liðgikt, og kann hetta seinni eggja til álvarsamar trupulleikar, sum til dømis slitgikt við pínu.

Serfrøðingar frá millum annað svøríki hava longu funnið fram til børn og ung, sum vegna overving av tummlinum hava fingið trupulleikar við sínum liðum og vøddum.

Tummilfingurin er ikki bygdur til at flytast skjótt yvir lítlar flatur, sum knappaborðið á fartelefonini leggur upp til.

Tølini siga, at í miðal senda danir 106.000 sms hvønn einasta tíma í døgninum, veit B.T at siga frá.

Fiskadjóralækni tekur undir við alarum:

# Koppseting móti ILA er loysnin

**Peter Østergaard, ið er fiskadjóralækni á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, heldur, at føroyingar eisini skulu fara undir at koppseta laks móti ILA sjúkuni. Loyvi skal tó fáast frá ES, áðrenn ein slík ætlan kann fremjast**

ILA
*Stefan í Skorini*



*Besta loysnin móti ILA hevði verið at koppsett fiskin, men ES hevur enn ikki givið loyvi til tess, og tí mugu alarar bíða, til evropeiski felagsskapurin góðtekur koppseting móti ILA*

– At koppseta laks móti ILA hevði verið ógvuliga klókt at gjørt í Føroyum, um vit skulu bjarga alivinnuni, sigur Peter Østergaard, fiskadjóralækni á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Trupulleikin higartil hevur verið, at koppsetingarnar ikki hava verið nóg góðar, men nú eru menn komnir so mikið langt við tí granskingini, at føroyingar eisini kunnu fara undir at koppseta laks.

Í skrivandi stund er Peter Østergaard saman við landsdjóralæknanum Bjørn Harlou á veg til Bruxelles á fund við fiskadjóralæknar úr Evropa. Peter Østergaard sigur, at her fara teir báðir at taka upp spurningin, hvørt laksur skal koppsetast móti ILA ella ikki.

– Vit fara sjálvandi at taka hetta málið upp á fundinum, tí hetta er sera viðkomandi fyri føroyingar beint nú, sigur Peter Østergaard.

### ES skal geva loyvi

ILA er á listanum hjá ES yvir tær álvarsamastu fiskasjúkurnar. Vanligt er ikki at koppseta móti sjúkunum á hesum listanum og felagsskapurin hevur enn ikki givið loyvi at koppseta móti ILA.

ES ber ótta fyri, at frískur fiskur kann gerast smittuberari og soleiðis breiða smittuna víða um.

Peter Østergaard væntar, at føroyingar fáa loyvi at koppseta nakað skjótt og vónandi verður tað klárt komandi vár.

– Í Føroyum kundu vit gjørt soleiðis, at øll alibrúk sluppu at koppseta uttan á Sandoy og í Suðuroy. Hesi kundu so givið ábendingar, um koppsetingin hevur verið við til at basa smittuni. Tað hevði verið best, um vit hava nøkur alibrúk, sum ikki eru koppsett, sigur Peter Østergaard.

Peter Østergaard heldur, at norðmenn eisini vilja í gongd við at koppseta laks, og hetta kann hava við sær, at loyvi fæst skjótt.

Peter er samdur við alarum og landsdjóralæknanum í, at ILA óviað verður at finna aðrastaðni í Føroyum nakað skjótt.

### Mugu ansa betur eftir

Havbúnaðarfelagið og vinnumálastýrið hava saman biðið eitt norskt felag um at gera ein kanning av smittuvandanum millum føroysk alibrúk, og hon fellur ein lemjandi dóm.

Føroyskir alarar gera sær ikki nóg stóran ómak fyri at forða smittum sum ILA í at breiða seg um landið. Hetta segði Útvarp Føroya í gjár.

Sagt varð millum annað, at alarar seta ov lítlan fisk út í ringarnar. Lítil fiskur er í størri vanda at gerast sjúkur enn størri fiskur, og tí er hetta ein vandi, sum alarar mugu taka til eftirtektar.

Alarar mugu tí eisini taka í egnan barm og gera sítt ítarsta fyri at basa smittum, ið hótta teirra egna lívsgrundarlag.



# Súkklurnar eru komnar

**Heilsusjúkrasystrarnar í Suðuroy hava fingið súkklur at brúka til arbeiðis í staðin fyri egnan bil, sum tær ikki vilja brúka.Tað boðar ikki frá góðum, heldur løgtingsmaður, sum hevur sett landsstýrismanninum fyrispurning um bilarnar hjá heilsusjúkrasystrunum**

FYRISPURNINGUR
*Edvard Joensen*



*Henrik Old hevur spurt landsstýrismannin við almanna- og heilsumálum, hvussu verður við bilum til heimarøktina. Úrslitið higartil er tvær súkklur, sum heilsusjúkrasystrarnar skulu ferðast um Suðuroynna við*

Heilsusjúkrasystrarnar í Suðuroy hava fingið súkklur at flyta seg á, tá tær skulu til arbeiðis. Slíkt er púra burturvið, heldur løgtingsmaðurin Henrik Old, sum hevur spurt landsstýrismannin við almanna- og heilsumálum, hvussu verður við bilum til skipanina.

Henrik Old, løgtingsmaður, setti seinasta mikudag Sámali Peturi í Grund, landsstýrismanni við almanna- og heilsumálum, munligan fyrispurning, um, hvussu verður við bilum til heimarøktina.

Tað er soleiðis, sigur Henrik Old, at heilsusjúkrasystrarnar hava síðan fyrsta oktober noktað at brúkt egnan bil til arbeiðis.

– Tað ber stutt sagt ikki til at krevja av teimum, at tær skulu binda ein privatbil til arbeiðis um kvøldið, meðan restin av familjuni so sitir við ongum, sigur Henrik Old.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, svaraði, at Almanna- og Heilsumálastýrið hevur biðið um at fáa pengar til sjey bilar á eykajáttanarlógini fyri oktober. Hetta skal so hjálpa upp á tørvin, sigur hann.

### Súkklur komnar

Henrik Old sigur í viðmerking, at tað er mikið gott við at biða um pengar til bilar. Men enn er eykajáttanarlógin ikki komin fyri tingið, so tað fer at taka eina tíð enn, áðrenn trupulleikin er loystur.

– Men ikki boðar tað frá góðum, sigur Henrik Old, at Meginskrivstovan hjá heimarøktini nú sendir heilsusjúkrasystrunum í Suðuroy eina súkklu til hvørt øki.

– Jú, tað er »idelig sannheit«, tekur hann aftur í aftur, at tað komu tvær súkklur suður nú í vikuni, sum fór. Ein dag seinkaðar, tí bilurin, sum kom við teimum, slapp ikki fram fyri kava, tann dagin, tær vóru við Smyrli. Tær skulu brúkast at ferðast innanbíggja við, verður sagt.

– Men hvat í Harrans navni skal ein tilkomin kona gera á eini súkklu millum Øravík og Froðba á nátt í øllum veðri? spyr Henrik Old.

Hann vísir á, at tað er eisini sera trupult at brúka Bygdaleiðir eit nú í norðara parti av Suðuroy. Ferðast skal úr Sandvík, til Fámjins. Og tað kunnu gang tímar í millum, at bussurin koyrir til Fámjins. So her er brúk fyri einum bili, vísir Henrik Old á.

### Bilarnir bíligari

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, váttar, at hann kennir til trupulleikan hjá heilsusjúkrasystrunum. Og hann er samdur við teimum, sum siga, at tað ber ikki til at leggja hald á ein privatbil, soleiðis sum gjørt hevur verið.

Sámal Petur í Grund sigur, at tey hava kannað á Almanna- og Heilsumálastýrinum, hvussu nógv tað kostar at lata heilsusjúkrasystrunum tænastubilar. Og úrslitið, tey komu til, var, at tað vóru beinleiðis pengar at spara við at keypa økjunum hvønn sín bil til arbeiðsbrúk hjá heilsusjúkrasystrunum. So eingin grundgeving er fyri at lata vera.

Hann gjørdi tí av at biða um pening til sjey bilar á eykajáttanarlógini fyri oktober, sigur Sámal Petur í Grund.

Men at heilsusjúkrasystrarnar hava fingið súklur sendandi til at brúka innanbíggja, kennir hann als einki til.

Á meginskrivstovuni hjá heimarøktini, sum hevur sent súkklurnar til Suðuroyar, ber ikki til at fáa orð á leiðaran, Jákup Foldbo. Hann er á skeiði, verður upplýst, og hann hevur boðað frá, at hann vil ikki órógvast.

# Klossut fiskiveiðieftirlit

**Henrik Old, løgtingsmaður, fer at spyrja landstýrismannin við fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, hvussu tað ber til, at enskur trolari kann sleppa at fiska undir Føroyum í fýra dagar uttan fiskiloyvi, fyri síðan at verða tikin**

FYRISPURNINGUR
*Edvard Joensen*




*Skiparin á Farnellu bar seg rætt at, men varð hildin fyri gjøldur av føroyskum myndugleikum, heldur Henrik Old, løgtingsmaður, sum nú vil hava Jørgen Niclasen, landsstýrismann við fiskivinnumálum, at staðfesta eina ábyrgd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Henrik Old, løgtingsmaður, fer at spyrja Jørgen Niclasen, landsstýrismann við fiskivinnumálum, hvussu tað ber til, at ein enskur trolari kann fiska fleiri dagar undir Føroyum, uttan at føroyskir myndugleikar gera vart við, at hann als einki fiskiloyvi hevur.

Tað var í seinastu viku, at enski trolarin Farnella varð tikin fyri at fiska uttan loyvi undir Føroyum. Men tá hevði hann verið her í fýra dagar, uttan at Vaktar- og Bjargingartænastan hevði gjørt hann varugan við, at hann ikki hevði loyvi at royna undir Føroyum.

– Tað er ótrúliga klossut, at so skal vera, sigur Henrik Old, sum vil hava at vita frá Jørgeni Niclasen, hvar feilurin liggur. Um tað er hjá reiðarínum í Bretlandi, ES fyrisitingini ella hjá okkara egnu fyrisiting, í hesum førinum Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Henrik Old vísir á, at tað at skiparin hevur boðað frá í góðari tíð, at hann kom inn á føroyskt øki, bendir á, at hann helt alt vera í lagi.

– Eingin fer at ringja til Førya Banka í arbeiðstíð at siga frá, at hann ætlar at bróta inn i bankan um náttina, vísir Henrik Old á sum eina samanbering.

Hann sigur, at tað skal eingin ivi ver um, at í somu løtu, sum fráboðanin kom, átti Fiskiveiðieftirlitið at sagt skiparanum frá, hvussu vorðið var. So var sloppið undan, at menninir mistu inntøku, og at vit standa við einum slíkum brølara, sum ikki eigur at koma fyri.

Hann heldur tað vera beinleiðis at halda fiskimenninar fyri spott at lata teir fiska í fýra dagar fyri síðan at senda Brimil eftir teimum og taka teir til Havnar, har teir aftur mistu nógvar dagar, meðan málið var fyri í rættinum.

Henrik Old, sum sjálvur er fiskimaður, sigur, at hann hevur sent nógvar slíkar fráboðanir, sum bretski skiparin sendi. Og tað er beinanveg, at svar er komið aftur, antin so ella so. Teir, tú sendir fráboðan til, vita, áðrenn tú kemur, um tú hevur loyvi at fiska ella ikki, og tað eiga føroyingar eisini at vita.

Tað tænir ikki føroyingum at bera seg soleiðis at sigur Henrik Old, sum nú vil hava Jørgen Niclasen, landsstýrismann við fiskivinnumálum, at staðfesta, hvar feilurin liggur.